


Alistair Carmichael vitjar Krígssavnið. Her saman við Rósu Samuelsen, borgarstjóra í Vága kommunu og umboðum fyri savnið, Karl Jóhan Nielsen, savnsleiðara og Dánjal Poulsen, nevndarlimi. Mynd Jan Müller/oljan.fo

# Bretskur ráðharri vitjaði Krígssavnið í Vágum

**Jan Müller**

14.03.2015 - 18:43

Oljan.fo

Tað gjørdist ein rættiliga hugvekjandi og kensluborin løta, tá fyrsti bretski ráðharrin nakrantíð, Alistair Carmichael, ráðharri fyri Skotland, vitjaði Krígssavnið í Vágum í vikuni í sambandi við almenna vitjan. Og hetta mundi eisini vera orsøkin til, at umboð fyri savnið og kommununa møttu so fjølment fyri at taka ímóti óvanliga gestinum.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri helt stutta røðu og beyð ráðharranum at vera vælkomnan til Føroya og til Krígssavnið, ið hon helt verða eitt sera gott høvi hjá honum at síggja og uppliva, hvussu stóran týdning bretsku hermenninir og teirra virksemi høvdu fyri Føroyar undir 2. heimsbardaga.

Síðani greiddi Karl Jóhan Nielsen, savnsleiðari, sera livandi frá søguni og ymsum hendingum undir krígnum, har tað eitt skifti vóru ikki færri enn 10.000 bretskir hermenn í Føroyum.

Alistair Carmichael segði seg kenna væl til søguna um bretsku innrásina og hvussu væl hon varð móttikin av íbúgvunum her. Og eisini hvussu væl bretar kendu seg í Føroyum. Hann fegnaðist eisini um, at føroyingar við hesum savninum hava megnað at varðveita hesa so sjáldsomu men góðu søgu fyri bæði føroyingar og bretar.Hann ynskti savninum og fólkunum aftanfyri tað góða eydnu.





































